## VIÐMERKINGAR

# Oljuprát

**Heðin Samuelsen**

Kjartan Hoydal var í farnu viku gestur í Sjónvarpinum í einum áhugaverdum práti um føroyska oljuvinnu. Uppá fyrispurning um vit áttu at havt eitt alment oljufelag, skiltist á honum, at hesin partur av vinnuni verður væntandi røktur nøktandi av teimum privatu. Kom tað almenna uppí skuldi tað – eins og Atlantic Petroleum ger nú – satsa við sínum innskotspeningi (skattaborgarans). Hetta alt eftir um tann dagur upprennur at olja finnst í rakstrarverdum nøgdum ella ikki. Tað kann væl vera, at hetta hevði verið treytin tað almenna felagið varð noytt at ganga undir fyri at kunna luttaka.

Men vit vita aðrarstaðni frá, eitt nú úr Danmørk og úr Noregi, at tað eyðnaðist tí almenna har at samráða seg fram til eina skipan har tað almenna oljufelagið tey fyrstu árini slapp at luttaka sum ein "borin" partur. T.v.s. at tey bjóðandi feløgini játtaðu at leggja kostnaðin út fyri tað almenna felagið (í Danmark var parturin hjá Dopas upp til 20 prosent) til inntøkur einaferð komu. Síðani var tann ígjøgnum árini akkumuleraða upphædd afturgoldin oljufeløgunum.

Víðari varð avtalað, at skuldi tað hent, at ongin olja varð funnin og tí ongar inntøkur komu, ja so vóru tað oljufeløgini sum høvdu satsað og bóru allan kostnaðin av hesum.

Um umstøðurnar til slíkar avtalur í dag eru heilt ørðvísi, dugi eg ikki at meta um. Men at tað eyðnast Atlantic Petroleum at samráða seg fram til eina optión, sum gevur rættindi til at ogna sær úr 0,1% upp til heili 5% í felagnum, um áhugi nú verður fyri tí, sigur helst eitt sindur um viljan hjá oljufeløgunum at veita føroyskum áhugamálum sersømdir.

Kári Petersen, búskaparfrøðingur og Regin Hammer frá Dong vóru herfyri frammi við einum roknistykki, um hvat kundi fáast burtur úr einum oljuøki á støðd við tey bæði sunnan fyri føroyska markið, sum eru millum 300/400 mió tnd hvørt. Minnist meg rætt mettu teir, at við einum tunnuprísi uppá 21 US$, lógu um 17 % av bruttoúrtøkuni eftir í kolvetnisskattum í Føroyum. 50 % fóru til at fáa oljuna upp og so vóru 33% eftir til sjálv oljufeløgini og teirra rakstur. Eitt slíkt økið verður mett at geva olju í eini 20-25 ár.

Í Noregi, Danmørk og í Onglandi har teirra egnu heimligu feløg: Statoil, Maersk, Dong, BP, Shell, British Gas o.a. standa fyri útbygging og framleiðslu, man roknistykkið helst verða øvugt. T.v.s. har liggur nógv tann størsti parturin av teimum 50% + 33 % sum avleitt virksemi heima, meðan restin fer í skattum. Hetta sigi eg uttan at vita tað, men havi varhugan av tí.

Í løtuni eiga føroyingar 1 túsundapart í hesu vinnu og hava møguleika til, við einum á Guernsey skrásettum felag, at hækka nakað um privatu føroysku luttøkuna. Hetta treyta av, at íleggjarar á London Stock Exchange trúgva uppá, at Hess hevur funnið ein elefant, hvørs langi trantur røkkur inn á økið hjá Agip.

Við einum "bornum" føroyskum oljufelag hevði helst ein munandi størri partur ligið eftir í Føroyum, ( samb. roknistykkið oman fyri einar 6-7 mia við 20 % luttøku) enn við tí leisti vit arbeiða eftir í dag. Eftir mínum tykki verður alt ov stórur dentur lagdur á "føroyskan keikant". Tað er av nógv stórri týdningi, at hava eyguni eftir at skattaog aðrar viðkomandi lógir syrgja fyri, at mest møgulig úrkoma av hesum tilfeingið, verður liggjandi eftir í Føroyum.

Minnir hetta okkum ikki sørt um toskin, sum vit avreiddu óvirkaðan uttanlands? Og hann varð enntá veiddur á føroyskum kjøli. Ta støðuna mettu vit ikki verða serliga skilagóða. Oljutilfeingið er ætlanin so gott sum alt at "veiða" á útlendskum kjøli og avreiða beinleiðis í útlandinum.

Skuldi tað hent seg, at olja er við Føroyar í rakstrarligum nøgdum, hava vit tá loyvi til, yvirfyri okkara eftirkomarum, at lata so lítlan part av landsins tilfeingið liggja eftir her heima? Tað sum krevst í hesu vinnu er ikki nógv annað enn í øllum øðrum vinnum, nevnliga: vit, skil, árræði og eitt sindur av peningi. Og her má sigast at Atlantic Petroleum hevur víst vegin.

Fyrsta útbjóðingarumfar er farið, so har kemst ikki afturumaftur. Spurningurin er so: skulu vit lata oljuna liggja í friði til vit sjálvi eru búgvin og før fyri at handfara hana, so vit fáa frægari burturúr enn hesi 17 % pluss keikantin?

Ella skulu vit skunda undir stovnsetanina av einum almennum føroyskum oljufelag, sum ígjøgnum Oljumálastýrið í einum møguligum komandi útbjóðingarumfarið kann tryggja Føroyum sersømdir, sum í eins stóran mun, ikki kunnu veitast privatum feløgum? Og tá hava vit ráð til at droppað "føroyskan keikant".

# Tað er einki minni enn fúl skomm

**Mortan Hentze**

1. januar kom nýggj bókasavnslóg í gildi í Føroyum, men lógin kann ikki setast í verk, tí at nærum eingin játtan fylgir við henni.

Í samrøðu við blaðmann á Dimmalætting vísir Løgmaður á, at nýggja bókasavnslógin ongantíð átti at verið samtykt í verandi líki. Løgmaður verður endurgivin fyri at siga: "Tí standa vit í dag við eini bókasavnslóg, sum í verandi líki ikki tekur hædd fyri, at bókasøvnini í framtíðini ikki fara at hava tað býtið millum land og kommunur, sum tey hava í dag" og hann sigur, at av hesi grund má lógin aftur ein túr í tingið. Løgmaður sigur harafturat í samrøðuni, at avgerð og ábyrgd má fylgjast við nýggja býtinum millum land og kommunur.

Aftan á at hava lisið omanfyristandandi viðmerkingarnar hjá Løgmanni um nýggju bókasavnslógina, setti eg mær sjálvum nakrar spurningar, um Løgmaður ynskir tað, er hann vælkomin at svara teimum:

Skal eg skilja Løgmann soleiðis, at orsøkin til, at neyðugi peningurin til at seta nýggju bókasavnslógina í verk ikki varð játtaður, er at býtið millum land og kommunur ikki er, sum hann kundi ynskt sær tað?

Eru vit komin hartil í Føroyum, at tað er loyvt Landsstýrinum, við Løgmanni á odda, at boykotta eina lóg, sum er samtykt av Føroya Løgtingi, tí hon inniheldur eina einkulta petitessu, sum Løgmanni ikki hóvar?

Er tað rímiligt, at landið skal liggja í bókasavnslógloysi, meðan vit bíða eftir hasum vælsignaða býtinum millum land og kommunu, sum kanska fer at koma einaferð, kanska ikki - er hetta ikki fullkomiliga vitleyst?

Hevur man kannað, hvat hendi í t.d. Danmark, tá tær einstøku kommunurnar í høvuðsheitum fingu ábyrgdina av at reka bókasøvnini? ... er tað avgjørt neyðugt, at vit endurtaka tey somu mistøkini, ið onnur longu hava gjørt?

Seinast í samrøðuni við blaðmannin leggur Løgmaður á allarbesta Nýrupskan hátt áherðslu á, hvussu avgerð og ábyrgd má fylgjast. Soleiðis skal tað vera Løgmaður, greið tala!

Og eg fari í hesum sambandi at minna Løgmann á, at Løgmaður, Landsstýri og øll aðalstýrini eins og vanligi borgarin hava ábyrgd av at fylgja teimum avgerðum ella lógum, sum eru samtyktar á Føroya Løgtingi. Men í hesum førinum, eins í so nógvum øðrum seinastu árini, hevur hetta ikki verið gjørt.

Ein kann bert enn einaferð staðfesta, at ovastu myndugleikar landsins als onga virðing hava fyri landsins lógum og bróta tær uttan at blunka. Í teirra verð kundi ábyrgd tað sama verið ein býur í Kina. Tað tykist sum um skomm ikki er skapt í hesum myndugleikum okkara, men tað skerst ikki burtur, at vit eru mong, sum skammast teirra vegna.

P.S.
Gud viti hvat hevði hent, um onkur gloymdi ella fekk hug at gloyma, at játta neyðuga peningin til ein nýggjan Smyril … hetta er heilt óhugsandi!

Ja, tað er tað, men tá tað kemur til mentan, ber alt til - ikki so?

## Eitt ár í býráðnum 3:

# Skúlamálini troka á

**Jógvan Arge**
*býráðslimur í Havn fyri tjóðveldisflokkin*



Skúlamálini eru átrokandi í Tórshavnar Kommunu. Vit hava átta fólkaskúlar. Onkur er rættiliga væl dagførdur, men fleiri eru ov smáir og hóska illa til krøvini, sum nútíðin setir. Tí verður úr øllum ættum rópt um nýbyggingar ella útbyggingar.

Sambært einum tilmæli, sum býráðslimir fingu frá fyrisitingini tíðliga í fjør, var brúk fyri at byggja fólkaskúlan út fyri einar 30-40 mió. kr. um árið í fleiri ár.

Ógvuliga lítið er framt í verki hetta farna árið. Eitt sindur varð summar bygt upp í Heimara skúla við Landavegin, sum hoyrir til Venjingarskúlan, og nakrar skúlastovur eru í heyst bygdar aftrat Hoyvíkar Skúla.

**Argir, Hoyvík, Kollafjørður og Kaldbak**

Farið er undir at meta um, hvat gerast kann á Argjum, í Hoyvíkshaganum og í Kollafirði.

Skúlin á Argjum má víðkast, tí skjótt kann hann ikki taka móti fleiri næmingum. Ein arkitektur hevur gjørt eitt skitsuuppskot, sum mentamálanevndin er kunnað um. Uppskotið er áhugavert og ikki sørt óvæntað.

Tær nýggju útstykkingarnar í Hoyvík fara at krevja meiri skúlapláss. Ætlanin er at byggja nýggjan skúla longur uppi, enn núverandi Hoyvíkar Skúli stendur. Arkitektar hava eisini í hesum førinum gjørt eitt skitsuprojekt. Her verður brotið upp úr nýggjum.

Felags fyri hesar ætlaðu byggingar er, at tær eru dýrar. Verða mettar til kanska einar 200 milliónir tilsamans. Men tær kunna fremjast í stigum, so møguleiki er fyri at gera eitt petti á Argjum, síðani eitt í Hoyvík o.s.fr. Endalig politisk støða er ikki tikin til nakað av hesum.

Kollafjarðar Skúli má nýtíðargerast. Býráðssamgongan hevur lagt til viks eina ætlan, sum kollfirðingar høvdu um at byggja ítróttarhøll og skúlastovur í einari bygging. Býráðið er farið undir at fyrireika hesar byggingar eftir øðrum leisti. Tey peningaligu krøvini eru eisini her stórt ivamál.

Eitt ætlan er gjørd um at útbyggja bygdarskúlan í Kaldbak, sum er vorðin alt ov trongur. Har hevur verið hugsað um samstundis at gera eina miðstøð í bygdini. Byggingin er ikki enn komin á íløguætlanina hjá Tórshavnar Kommunu, men kann fremjast í fleiri stigum og skúlahølini sjálvi kunnu byggjast fyrst.

**Skúlarnir í Havn**

Teir tríggir eldru skúlarnir í Havn: Nonnuskúlin, Kommunuskúlin og Venjingarskúlin hava síni krøv um umbyggingar og aftratbyggingar, tí teimum vantar pláss til ymisk endamál.

Eysturskúlin er tann nýggjasti skúlin í kommununi og er tann, sum best lýkur krøvini, sum eru komin aftrat við teirri nýggju fólkaskúlalógini.

Longur frammi í tíðini liggur ein ætlan um at byggja ein Vesturskúla tætt við Handilsskúlan at taka móti børnum úr Vesturbýnum.

Skúlabarnatalið er vaksið ógvuliga skjótt hesi seinastu árini. Eftir bara fýra árum er næmingatalið í skúlunum í Tórshavnar Kommunu økt við útivið 500 børnum.

Næmingarnir í fólkaskúlanum vóru 2478 í tali í skúlaárinum, sum byrjaði í august 1997, og í skúlaárinum, sum byrjaði í august 2001, eru næmingarnir 2973. Sum út sær í løtuni fer barnatalið at økjast javnt og samt.

Spurningurin er tí, nær nakað hendir við skúlunum. Tórshavnar Kommuna kann í árinum 2002 gera íløgur fyri 65 milliónir krónur í onnur endamál enn havnarbyggingar. Enn er ikki komið undan kavi, hvussu stóran part av hesum milliónunum, býráðssamgongan ætlar at brúka til skúlabygging.

Men tað verður í so snorkið, um talið ikki skjótt fer at liggja onkustaðni í nánd av 20-25 milliónum krónum um árið. Fyri minni gerst so lítið, og minni játtanin verður, størri verða trupulleikarnir á skúlunum.

So her ræður um at seta út í kortið og koma í gongd.